Fylgiskjal 2.

LM-080/2023

Guðrun Maria Mortensen

Fra: Rúna Fossdal Guttesen
Sendt: 11. januar 2024 11:14
Til: Heilsumálaráðið; Guðrun Maria Mortensen
Emne: SV: TIL HOYRINGAR: Lógaruppskot um broyting í heilsutrygdarlógini (Lógaruppskot um broyting í heilsutrygdarlógini (undantak fyri gjaldsskyldu, afturgjaldsreglur og heimild til innheinting av skuld o.a.)

Heilsumálaráðið,

Taks hevur somu viðmerkingar, sum vit sendu Heilsumálaráðnum 27. november 2023.

Innheintingarkostnaður eigur eisini at verða nevndur í § 26a, stk. 1, 2 og 3.

Aftast í § 26a, stk. 2 eigur at verða sett: " , tó er § 7, stk. 1 í lov for Færøerne om inddrivelse af skatter og afgiter til det offentlige m.m. ikki galdandi". Við hesi orðing verður tryggjað at panting ikki neyðturviliga skal fremjast innan 2 ár, men innanfyri vanligu fyrningarfreistina.

Fyri at kunna umsita undantøkini í lógini er neyðugt at Heilsumálaráðið/Heilsutrygd mennir eina skipan, har teir persónar, sum skulu vera umfataðir av undantøkunum, verða skrásettir og hvat tíðarskeið, undantakið er galdandi fyri. TAKS skal hava atgongd til hesa skrá, og skipanirnar hjá TAKS skulu síðan lagast til at taka hædd fyri hesum undantøkum.

Ímframt hetta er neyðugt at Heilsutrygd ger upp og skrásetir møgulig krøv, har persónar av órøttum hava fingið undantak og skulu gjalda innaftur. Hesi krøv skulu síðan sendast til TAKS at heinta inn.

Menningararbeiðið, sum skal gerast hjá TAKS, kann leysliga metast til 300.000 kr. Afturat hesum kemur kostnaður til menningararbeiðið av eini skipan hjá Heilsumálaráðnum/Heilsutrygd. Hendan kostnað kenna vit ikki.

Vinarliga

Rúna F. Guttesen
ráðgevi
tel. 352743

TAKS
Postrúm 2151, 110 Tórshavn
www.taks.fo, taks@taks.fo, tel. 35 26 00

Fyrivarni
Ert tú ikki rætti móttakari av hesum teldubrævi, vinarliga sig mær frá og sletta brævið.

Notice
Please notify me and delete this e-mail and its contents if you are not the intended recipient of this e-mail.